**10. Fylgiskjal II:**

# LANDSGRANNSKOÐANIN

Upprit

um stuðul

til

Adventistaskúlan, Føroya Fólkaháskúla og
Húsarhaldsskúla Føroya

August 2007

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

# Innihaldsyvirlit

**1. INNGANGUR 153**

**2. ADVENTISTASKÚLIN 153**

**3. FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI 155**

**4. HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA 157**

**5. KLAKSVÍKAR HÚSMØÐRAFELAG 159**

**6. JÁTTANARSLAG 161**

# 1. Inngangur

Landsgrannskoðanin hevur kunnað seg gjøllari um umsitingina av játtanini til Adventistaskúlan, Føroya Fólkaháskúla og Húsarhaldsskúla Føroya. Í hesum sambandi bóðu vit Mentamálaráðið útvega Landsgrannskoðanini nakrar roknskapir og grannskoðanarfrágreiðingar, og niðanfyri verður greitt frá gjøgnumgongd okkara.

Í september 2007 sendu vit eina frágreiðing til landsstýrismannin, har vit settu honum talmerktar spurningar. Í november 2007 svaraði landsstýrismaðurin nøkrum spurningum, og svarini eru sett inn.

# 2. Adventistaskúlin

## 2.1. Lógargrundarlag

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2006 stendur: “*Sambært Ll. nr. 46 frá 26. mars 2002 “um frískúlar” kunnu frískúlar, sum eru góðkendir av landsstýrismanninum, og undirvísa aldursbólkum samsvarandi 1.- 9. skúlaár í fólkaskúlanum, fáa stuðul smb. §18 í lógini. Virksemið hjá frískúlum verður partvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Landsstýrisins partur av rakstrinum svarar til 85% av góðkendum lærarалønum.*”

## 2.2. Játtanar- og roknskapartøl

7.23.2.03.03. Privatir skúlar (onnur játtan)

t.kr.

| **Fíggjarár** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | R | R | R | J |
| *20. Vanligt virksemi* | | | | | | |
| **Nettoútreiðsla** | **1.870** | **1.985** | **2.388** | **2.114** | **2.545** | **2.486** |
| *Útreiðslur* | | | | | | |
| 52. Tilskot til einstaklingar | - | - | - | - | 944 | |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.870 | 2.360 | 3.295 | 3.309 | 2.552 | 2.486 |
| *Inntøkur* | | | | | | |
| 77. Flyting frá kommunum | - | -375 | -907 | -923 | -951 | - |

Játtanin fer til Adventistaskúlan. Skúlaraksturin er frá 1. august 2003 lagdur um til ein sjálveigandi stovn. Skúlin heldur til í leigaðum hølum hjá Adventistasamkomuni. Árliga leigan er 400 t.kr. Stuðulin frá Adventistasamkomuni er árliga um 350 t.kr.

Síðani 2006 hevur Mentamálaráðið í fyrsta umfari lagt stuðulin út fyri kommunurnar. Við ársenda endurrindar Føroya Gjaldstova vegna avvarðandi kommunur Mentamálaráðnum stuðulin.

Vit hava gjøgnumgingið roknskap og grannskoðanarfrágreiðing fyri 2006. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at. ***1) Vit hava spurt, hvussu Mentamálaráðið hevur tryggjað sær, at studningurin er veittur sambært ásetingunum í lógini.***

Í november 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at við grundarlagi í næmingatalið fær skúlin tímar tillutaðar. Skúlin sendir eisini inn fíggjarætlan fyri komandi skúlaár, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Skúlin kann ikki uttan loyvi frá landsstýrismanninum fara upp um játtanina sambært góðkendari fíggjarætlan.

Sambært § 20 í Ll. nr. 46 frá 26. mars 2002 sendir skúlin inn grannskoðaðan roknskap fyri farið ár fyrst í eftirfylgjandi ári. Tá roknskapurin er góðkendur, verður stuðulsupphæddin javnað samsvarandi.

# 3. Føroya Fólkaháskúli

## 3.1. Lógargrundarlag

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2006 stendur: “*Sambært løgtingslóg nr. 101 frá 1978 verður játtan latin fólkaháskúlum. Føroya Fólkaháskúli er sjálveigandi stovnur. Ætlanin við skúlanum er at vekja ans fyri andligum og kropsligum mentum og at menna føroyska sjálvsfatan og føroyskt medvit.*”

Í § 2 í løgtingslóg nr. 101 frá 1. desember 1978 v.s.b. “um studning til fólkaháskúlar” er ásett treyt fyri stuðli úr landskassasum:

> *Áðrenn studningur verður latin, skal skúlin við møguligum serdeildum verða góðkendur av landsstýrismanninum. Góðkenningin skal verða knýtt at einum einstaklingi ella einum felag.*
>
> *Stk.2. Fyri at fáa studning má skúlin árið fyri í minsta lagi hava havt 12 ársnæmingar. Næmingar, ið eru undir 17 ár, tá skeiðið byrjar, verða ikki roknaðir uppí.*

Í § 3, stk. 1, nr. 5, í Ll. nr. 101/1978 v.s.b. er ásett, at studningur verður latin “*til eina eftirlønarskipan eftir nærri reglum, sum landsstýrismaðurin fyriskipar.*” ***2) Vit hava biðið um avrit av reglunum, sum landsstýrismaðurin hevur fyriskipað.***

Í november 2007 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at eingin reglugerð er um eftirlønarskipan á Føroya Fólkaháskúla. Leiðarar og lærarar skúlans, sum eru farnir úr starvi, hava higartil fingið eftirløn eftir somu skipan sum tænastumenn fólkaskúlans. Fram til 1975 var eftirlønargjaldið goldið í serligan eftirlønargrunn, har lærararnir rindaðu 4% av lønini og skúlin 7%, tá eftirlønargjaldið hjá lærarunum steðgaði. Síðani varð eftirlønargjaldið játtað á fíggjarlógini og flutt skúlanum at gjalda út. Sambært landsstýrismanninum var henda skipan galdandi til í hvussu so er januar 1989.

Í semju 3. februar 1988 millum Landsstýrið og Føroya Lærarafelag eru í § 7 ásettar reglur um eftirløn hjá lærarum, sum ikki eru tænastumenn. Stk. 3, pkt. b, fatar um lærarar, sum starvast á stovnum, sum hava tilknýti til fólkaskúlan.

Lærarar og leiðarar háskúlans verða framvegis settir eftir somu lønartreytum sum lærarar fólkaskúlans.

Mentamálaráðið hevur seinastu árini arbeitt við at fáa reglur um eina eftirlønarskipan, sum ásett í lógini um studning til Føroya Fólkaháskúla. Tað er landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, sum hevur málsøkið at áseta lønar- og eftirlønarviðurskifti. Mentamálaráðið hevur tí í mars 2006 vent sær til Fíggjarmálaráðið um hesi viðurskifti, men eingin avtala er gjørd higartil.

Í § 5 í somu lóg er ásett, at ”*studningur verður latin til næmingar skúlans eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur í samráð við skúlaleiðaran*”. ***3) Vit hava biðið um avrit av reglunum, sum landsstýrismaðurin hevur ásett.***

Í november 2007 hava vit fingið avrit av skrivi frá november 1993 frá landsstýrismanninum í mentamálum til Føroya Fólkaháskúla. Har verður boðað frá, at næmingastuðulin verður hækkaður úr kr. 2.000 í kr. 2.400 um mánaðin við gildi frá háskúlaskeiðinum november 1993 – juni 1994.

## 3.2. Játtanar- og roknskapartøl

7.23.5.01. Føroya Fólkaháskúli (onnur játtan)

t.kr.

| Fíggjarár | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | R | R | R | J |
| *20. Vanligt virksemi* | | | | | | |
| **Nettoútreiðsla** | **2.058** | **2.421** | **2.393** | **2.382** | **2.221** | **2.506** |
| *Útreiðslur* | | | | | | |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 253 | 332 | 360 | 267 | 322 | 350 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.805 | 2.089 | 2.033 | 2.115 | 1.899 | 2.156 |

Í § 3 í Ll. nr. 101/1978 v.s.b. er ásett, hvussu studningur til fólkaháskúlar verður latin:

1) *Til keyp av húsum og til bygging ella umbygging av húsum til fólkaháskúla verður eftir landsstýrismansins góðkenning, sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin 50% av virðinum eftir virðismeting.*
2) *Til keyp av innbúgvi og undirvísingaramboðum verður latin 50% av kostnaðinum.*
3) *Til lønina hjá skúlaleiðaranum verða latin 100%.*
4) *Til allar aðrar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til læraralønir, ljós og hita, leigu, umvæling av húsum v.m., undirvísingartilfari, trygging o.s.fr. verða latin 70% av kostnaðinum.*

Vit hava gjøgnumgingið roknskap og grannskoðanarfrágreiðing. Sambært grannskoðanarfrágreiðingini var einki at finnast at. ***4) Vit hava spurt, hvussu Mentamálaráðið hevur tryggjað sær, at studningurin er veittur sambært ásetingunum í lógini.***

Í november 2007 hevur landsstýrismaðurin svarað, at skúlin letur í juni inn fíggjarætlan fyri komandi ár til landsstýrismannin at góðkenna. Skúlin kann ikki uttan loyvi frá landsstýrismanninum fara upp um játtanina sambært góðkendari fíggjarætlan.

Fyrst í árinum sendir skúlin sendir inn grannskoðaðan roknskap fyri farna árið. Tá roknskapurin er góðkendur, verður stuðulsupphæddin javnað samsvarandi.

# 4. Húsarhaldsskúli Føroya

## 4.1. Lógargrundarlag

Í viðmerkingunum til løgtingsfíggjarlógina 2006 stendur: “*Í 1992 gjørdist skúlin sjálvsognarstovnur. Skúlin hevur árliga skeið, sum er 26 vikur frá august til februar og fleiri stutt skeið frá mars til juni mánað. 21 næmingar kunnu ganga í skúlanum. Stovnurin rekur Húsarhaldsskúla Føroya sambært løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 um Húsarhaldsskúla Føroya. Skúlin fær stuðul sambært § 11 í Ll. nr. 66 frá 13. mai 1992. Næmingastuðul verður játtaður sambært kunngerð nr. 80 frá 1. aug. 1991. Hesin stuðul verður játtaður á sama rakstrarstaði, sum stuðulin til skúlan.*” ***5) Vit hava biðið um avrit av viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin.***

### *4.1.1. Studningur til rakstur av skúlanum*

Í § 11 í Ll. nr. 66/1992 er ásett, hvussu studningur til húsarhaldsskúlar verður latin:

1. *Til keyp av húsum ella til bygging ella umbygging av húsum til húsarhaldsskúla verða, eftir landsstýrisins góðkenning, sum rentu- og avdráttarfrí lán latin 50% úr landskassanum og 25% av kommununi, har skúlin er.*
2. *Til keyp av innbúgvi og undirvísingaramboðum verða latin 50% av kostnaðinum úr landskassanum, smb. reglugerð.*
3. *Lønin til fyristøðufólkið verður goldin úr landskassanum.*
4. *Fær skúlin eina eftirlønartrygging, verður studningur latin úr landskassanum eftir nærri settum reglum, sum landsstýrið fyriskipar.*
5. *Landskassin rindar 70% av øllum øðrum góðkendum rakstrarútreiðslum, heruppií útreiðslur til læraralønir, ljós, hita, leigu, umvæling av húsum, rentur, trygging o.s.fr., tó ikki útreiðslur til matvørur og annað tílíkt undirvísingartilfar.*

Stk. 2. Treytin fyri stuðli úr landskassanum er:

*at* *skúlin í hvørjum fíggjarári gjøgnumførir minst eitt 20 viku langt góðkent skeið,*

*at* *skúlin í viðkomandi fíggjarári hevur havt minst 12 ársnæmingar. Bert næmingar, sum hava verið á skúlanum í meira enn 1 undirvísingarviku, verða taldir við í ársnæmingatalið. Bert næmingar, sum hava aldur at fáa almennan stuðul, verða roknaðir uppí ársnæmingatalið,*

*at* *fyristøðufólkið og lærarar skúlans verða lønt eftir reglum, sum Landsstýrið setir.*

***6) Vit hava spurt, hvussu Mentamálaráðið hevur tryggjað, at studningurin er veittur sambært ásetingunum í lógini.***

### *4.1.2. Næmingagjald*

Kunngerð nr. 80 frá 1. august 1991 ”um veiting av næmingastudningi til Húsarhaldsskúla Føroya” er heimilað í § 4 í løgtingslóg nr. 47 frá 9. mai 1976 ”um stuðul til húsarhaldsskúlar”. Løgtingslógin varð tikin av 1. juli 1992 sambært løgtingslóg nr. 66 frá 13. mai 1992 ”um húsarhaldsskúlar”. Samstundis fór K. nr. 80/1991 úr gildi. Sostatt tykist teksturin á fíggjarlógini mísvísandi. ***7) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum.***

Sambært § 12 í Ll. nr. 66/1992 v.s.b. ”*ger landsstýrismaðurin reglur viðvíkjandi næmingagjaldinum og skal til eina og hvørja tíð góðkenna gjaldsupphæddina*”. ***8) Vit hava spurt nær, og hvørjar gjaldsupphæddir landsstýrismaðurin hevur góðkent.***

Sambært § 12, stk. 1, ”*verður veittur næmingunum stuðul smb. reglum ásettum av Landsstýrinum*”. ***9) Vit hava biðið um avrit av reglunum, sum landsstýrismaðurin hevur ásett.***

## 4.2. Játtanar- og roknskapartøl

7.23.5.04. Húsarhaldsskúlar (onnur játtan)

t.kr.

| Fíggjarár | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | R | R | R | R | R | J |
| *20. Vanligt virksemi* | | | | | | |
| **Nettoútreiðsla** | **1.644** | **1.803** | **1.764** | **1.832** | **1.997** | **2.030** |
| *Útreiðslur* | | | | | | |
| 52. Tilskot til einstaklingar | 294 | 210 | 294 | 294 | 294 | 294 |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.350 | 1.593 | 1.470 | 1.538 | 1.703 | 1.736 |

Sambært roknskapinum hjá Húsarhaldsskúla Føroya 2005 og 2006 rindar skúlin árliga húsaleigu uppá 172 t.kr. Skúlin rindaði 131 t.kr. til viðlíkahald í 2006 og 179 t.kr. í 2005.

***Vit hava spurt:***

***10) hví húsarhaldsskúlin rindar leigu, og biðið verður um avrit av leigusáttmálanum,***

***11) hvat viðlíkahaldsútreiðslurnar fara til.***

## 4.3. Fíggjarstøðan

### *4.3.1. Negativ eginogn/millumrokning við Klaksvíkar Húsmøðrafelag*

Skúlin skyldar Klaksvíkar Húsmøðrafelag 896 t.kr., og sambært roknskapinum hjá Húsarhaldsskúla Føroya 2006 er eginognin negativ við 509 t.kr. ***12) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum til, at eginognin er negativ.***

### *4.3.2. Skuld til landskassan*

Sambært roknskapinum skyldar skúlin landskassanum 108 t.kr. Við árslok er stuttfreistað skuld 326 t.kr., og skúlin hevði 622 t.kr. innistandandi í peningastovni. ***13) Vit hava biðið um frágreiðing um skuldina til landskassan og spurt, hví skuldin ikki er goldin.***

# 5. Klaksvíkar Húsmøðrafelag

Landsgrannskoðanin hevur fingið roknskapin hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag fyri 2004.

***14) Vit hava heitt á landsstýrismannin um at útvega Landsgrannskoðanini roknskap og grannskoðanarprotoll/-frágreiðing fyri Klaksvíkar Húsmøðrafelag fyri 2005 og 2006.***

## 5.1. Rakstrarroknskapur

Rakstrarroknskapurin 2004 fevnir um rakstur av tveimum bygningum:

- Bøgøta 3, matr.nr. 668
- Stoyksoyrarvegur 29, matr. 148

Niðanfyri er ein samandráttur av roknskapartølunum.

t.kr.

| | **Matr. 148** | **Matr.668** |
|---|---:|---:|
| Leiguinntøkur | 172 | 210 |
| Inntøkur av bingo | 0 | 109 |
| | **172** | **319** |
| Umsiting o.t. | -8 | -35 |
| Trygging | -10 | -5 |
| Úrslit áðrenn rentur | **154** | **279** |
| Rentur | -89 | -162 |
| Ársúrslit | **65** | **117** |

Allar bingoinntøkur verða bókaðar á matr. nr. 668. ***15) Vit hava biðið um eina frágreiðing.***

Leiguinntøkurnar hjá matr. nr. 148 svara til tær leiguútreiðslur, sum Húsarhaldsskúli Føroya hevur í sínum roknskapi. Ongar útreiðslur eru til viðlíkahald av hvørki matr. 148 ella 668. ***16) Vit hava spurt, hvar útreiðslurnar til viðlíkahald av ávikavist matr. nr. 148 og 668 verða bókaðar.***

Sambært roknskapinum hjá Húsarhaldsskúla Føroya vóru viðlíkahaldsútreiðslurnar 131 t.kr. í 2006 og 179 t.kr. í 2005. ***17) Vit hava spurt, hvønn av bygningunum hesar viðlíkahaldsútreiðslur fara til.***

## 5.2. Fíggjarstøða

Niðanfyri er ein samandráttur av fíggjarstøðuni 2004

t.kr.

| **Aktiv:** | |
|---|---:|
| Bygningur við studningi | 911 |
| Annar bygningur | 2.100 |
| Bygningur, matr. 668 | 1.856 |
| • Umbyggingar 2002-2004 | 1.006 |
| Innbúgv | 40 |
| | **5.913** |

| | |
|---|---|
| Skuldarar | 15 |
| Millumrokning – Húsarhaldsskúli Føroya | 896 |
| | **911** |
| Innistandandi í peningastovnum | 11 |
| Aktiv, samanlagt | 6.836 |

***18) Vit hava spurt, hvør bygningur verður nýttur til Húsarhaldsskúla Føroya.***

Í roknskapinum 2004 hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag tekur grannskoðarin fyrivarni fyri virðisásetingini av millumrokningini við Húsarhaldsskúla Føroya uppá 896 t.kr., og eisini fyrivarni fyri bókførdu virðunum av bygningunum. ***Vit hava spurt:***

***19) hvussu millumrokningin er íkomin, og***

***20) hvørja støðu Mentamálaráðið hevur til umrøddu grannskoðarafyrivarni.***

Grannskoðarin hjá Húsarhaldsskúla Føroya tekur ikki fyrivarni fyri millumrokningini. Vísandi til samantvinningina av roknskapunum heldur Landsgrannskoðanin, at rættast hevði verið, at sami grannskoðari grannskoðar roknskapirnar. ***21) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum.***

| **Passiv:** | |
|---|---|
| Eginpeningur | 2.913 |
| Lán: Norðoya Sparikassi | 1.124 |
| Norðoya Sparikassi | 2.086 |
| Føroya Landsstýri (rentu og avdráttarfrítt) | **455** |
| Klaksvíkar Kommuna (rentu og avdráttarfrítt) | 258 |
| | 3.923 |
| Passiv, samanlagt | 6.836 |

Eginognin í Húsarhaldsskúla Føroya er negativ við um 0,5 mió.kr. í 2006, samstundis sum eginognin í Húsmøðrafelagnum er um 3 mió.kr. ***22) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum.***

Talan um 2 lán í peningastovni. ***23) Vit hava spurt, hvat av hesum lánum hevur við Húsarhaldsskúla Føroya at gera.***

Sambært landsroknskapinum er rentu- og avdráttarfrítt útlán, 455 t.kr., veitt Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík. Lánið er heimilað í Ll. nr. 47 frá 9. mai 1976 "um stuðul til húsarhaldsskúlar". Føroya Landsstýri hevur tinglýst veðbræv upp á 455 t.kr. við trygd í hesi ogn.

Landskassalánið er við í roknskapinum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag. Sambært tingbókini er Klaksvíkar Húsmøðrafelag eigari av ognini. Sambært veðbrævinum er lánið veitt til "*umbygging av húsinum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag til nýtslu sum húsarhaldsskúla*".

## 6. Játtanarslag

Felags fyri játtanirnar til Adventistarskúlan, Føroya Fólkaháskúla og Húsarhaldsskúla Føroya er, at landið fíggjar so at siga allan raksturin av virkseminum. Landsgrannskoðanin heldur, at tað út frá einum eftirlitssjónarmiði kann vera óheppið, at landið veitir ein so stóran árligan rakstrarstuðul sum ”onnur játtan”. Um játtanirnar høvdu verið tiknar við á fíggjarlógina sum ein ”rakstrarjáttan”, høvdu skúlarnir komið undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar***. 24) Vit hava biðið um viðmerkingar frá landsstýrismanninum.***